FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 16. mars 2020
J. nr.: 20/00101-2
Viðgjørt: EJ

Svar uppá spurning nr. 59/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um landskassans part av útreiðslunum at umvæla grótkøst, sum eru farin í ódnarveðrinum.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at landskassin skal bera part av útreiðslunum at umvæla grótkøst, sum eru farin í ódnarveðrinum seinastu dagarnar?
2. Um so er, hvussu stóran part?

Svar:
Spurningurin snýr seg um umvælingar av kommunalum grótkøstum, men hóast kommunurnar hava ábyrgd av egnum viðurskiftum, eru dømi um, at landskassin fyrr hevur borið part av útreiðslunum at umvæla grótkøst, sum hava fingið skaða undir líknandi umstøðum. Í sambandi við skaðarnar, sum hendu í Skálavík og Hvalba í 2008, lat landskassin ávikavist 400 tús. kr. og 900 tús. kr., ið runt roknað svaraði til umleið ein tíggjundapart av umvælingarkostnaðinum.

Aftaná ódnina um mánaðarskiftið er frætt um skaðar á grótkøst o.a. ymsa staðni í landinum. Í onkrum førum er kanska enntá talan um so stórar skaðar, at avvarðandi kommunur lutfalsliga eru ov smáar fíggjarligar eindir til einsamallar at bera kostnaðin av at endurbøta skaðarnar.

Samband hevur verið millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið um hesi viðurskifti, har m.a. møguleikin við einum vanlukkugrunni varð umrøddur. Uttan mun til, hvør loysnin verður, er tó greitt, at fleiri spurningar mugu viðgerðast í hesum sambandi.

Her eru avbjóðingar, men enn er ov tíðliga at gera endaliga niðurstøðu.

Tinganes, 16. mars 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum